# Spakin settur í til badmintonhøll




*Í gjár varð spakin so settur í, og borgarstjórin Steinbjørn Jacobsen kundi ynskja stigtakaranum Jákupi Anthoniussen góða eydnu við nýggju badmintonhøllini*

*Mynd: Dávur Winther*

**Eftir fyrireikingar í nøkur ár, varð spakin til eina badmintonhøll í Klaksvík umsíðir settur í í gjár**

KLAKSVÍK
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Tað var ein sera fegin borgarstjóri, sum í gjár setti spakan í til Klaksvíkar Badmintonhøll beint sunnanfyri KÍ høllina. Í stuttari røðu segði Steinbjørn Jacobsen millum annað um stigtakaran Jákup Anthoniussen

- Jákup man vera ein tann treiskasti maðurin, eg kenni – treiskur á ein óvanliga positivan hátt við tí ótroyttiliga ágrýtni, hann hevur lagt í arbeiðið at fáa klaksvíkingum og norðoyingum eina badmintonhøll.

### Íróttarmiðdepil

Nýggja høllin skal byggjast beint sunnanvert KÍ høllina, og verður um somu støðd, sum hendan. Eftir ætlan skulu hallirnar í avísan mun byggjast saman við einum millumbygningi, sum skal kunna brúkast sum felags goymsluhøli. Eisini er ætlanin, at millumbygningurin skal gera tað møguligt at taka báðar hallirnar í nýtslu samstundis til eitt nú størri sølustevnir og líknandi.

At høllin kemur at liggja beint í hjartanum á ítróttarøkinum í Klaksvík, halda stigtakararnir bara kann verða ein fyrimunur. Svimllin liggur beint við og bert fáir metrar eru til KÍ høllina. Sostatt verðu mest sum talan um ein nýggjan ítróttarmiðdepil í Klaksvík. Sum skilst, kemur tað eisini meir enn so fyri, at plásstrot er í høllunum á Kambsdali og á Skála, so uttan iva fara eysturoyingar eisini at fáa gleði at víðkaðu ítróttarmøguleikunum í Klaksvík – ikki minst nú ferðasambandið verður so nógv høgligari.

### Góðan stuðul

Tað er Jákup Anthoniussen úr Klaksvík, sum hesi seinastu trý árini hevur staðið á odda fyri arbeiðinum at fyrireika arbeiðið og útvega fígging til badmintonhøllina. Jákup sigur, at hóast tað hevur tikið sína tíð, hevur tað samanumtikið gingið væl at skaffa fígging til høllina. Góður stuðul er fingin frá bæðið landinum og kommununi, og eisini hevur Mærsk McKinney Møller sýnt høllini vælvild. Út frá fyriliggjandi fíggjarætlan kemur høllin at kosta á leið 14 milliónir kr. Nú spakin er settur í, og arbeiðið kann byrja, væntar Jákup, at høllin verður klár at taka í nýtslu í august mánað næsta ár. Tað er byggifyriøkan Norðhús í Klaksvík, sum kemur at standa fyri arbeiðinum.

## TjaldinG!arpass í forsølu

Í fjør var slíkur gravgangur eftir tjalding á G!, at tað var strævið at fylgja við. Tískil verða atgongumerki til tjaldingina á G! í ár, tjaldingarpassini, at fáa í forsølu, samstundis sum vanligu festivalatgongumerkini, festivalpassini, ið fara til sølu nú leygardagin.

Tjaldingarøkið á G! er helst tað størsta í Føroyum dagarnar festivalurin varar. Fyri at fáa atgongd til tjaldingarøkið er neyðugt við bæði tjaldingarpassi og festivalpassi. Tjaldingarpassini, sum eru galdandi fyri allar dagarnar festivalurin varar, kosta 150,- kr stykkið. Seinasta ár vóru onkrir trupulleikar at veita ávísar tænastur í samband við tjaldingina, stutt sagt vegna ovurstóra eftirspurningin, men hetta verður strammað munandi upp í ár til tess at veita best møguligu tænastuna til tjaldararnar.




Hagstova Føroya er sjálvstøðugi hagtalsstovnur landsins. Stovnurin er í trimum deildum - Hagtalsdeild, KT-deild og Útgávudeild, sum samstarva um at veita almenninginum góð og skjót hagtøl um so nógv viðurskifti sum til ber. Á stovninum arbeiða 15 fólk - búskaparfrøðingar, samfelagsfrøðingar, KT-tøkningar og skrivstovufólk.

STARV

BÚSKAPARFRØÐINGUR Á HAGSTOVUNA

HAGSTOVAN SØKIR EFTIR EINUM BÚSKAPARFRØÐINGI TIL AT STANDA FYRI HAGTØLUNUM UM GJALDSJAVNA OG UTTANLANDSSKULD.

**Ábyrgd**
Búskaparfrøðingarnir á Hagstovuni eru eitt toymi, sum arbeiðir tætt saman í felags arbeiðsætlan, har hvør einstakur kortini hevur sínar ábyrgdir.
Uppgávan er at vera partur av toyminum um tjóðarroknskapin, at hava ábyrgdina av uppgerðunum av gjaldsjavna og uttanlandaskuld, at stíla fyri innsavningini og viðgerðini av upplýsingum, at fremja uppgerðina sambært altjóða forskriftum og at kunngera úrslitini.

**Førleikar**
Vit sóknast tí eftir einum akademiskt útbúnum búskaparfrøðingi, við áhuga fyri tjóðarbúskapi og hagtølum sum heild. Uppgávan krevur góðan kunnleika til vinnuligu viðurskiftini í landinum og samstundis krevjast góðir førleikar til hagtalsliga viðgerð av innheintaðum upplýsingum.

Haraftrat vænta vit, at tú hevur royndir av fakligum analytiskum arbeiði, sum seta teg føran fyri at geva sjálvstøðugt íkast til menningina av týðandi informasjón um samfelagsbúskapin. Vit vænta eisini, at tú hevur evnini at gera torfør mál einføld hjá øðrum at skilja, so at tú lættliga kannst samstarva við tøknideildina, samstarvs-felagar annars og eisini dugir at greiða frá fløktum viðurskiftum á ein lættfatiligan hátt.

Góð samstarvsevni og ein positivan hugburð til uppgávuna leggja vit stóran dent á. Á Hagstovuni telja fólk, men fyri okkum eru tað fólkini ið telja.

**Starvið**
Starvið er fultrúastarv á Hagstovuni og verður samsýnt við løn sambært galdandi sáttmála millum Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya og Landsstýrið.

Umsóknarfreistin er 15. mei 2005, tá skrivlig umsókn skal vera okkum í hendi. Vilt tú vita meira um starv, treytir og arbeiðspláss, ring so til Hermann Oskarsson ella John Jacobsen á telefon 35 28 00.

HAGSTOVA FØROYA
TRAÐARGØTA 39 · POSTRÚM 2068 · FO-165 ARGIR
TLF. +298 35 28 00 · FAX +298 35 28 01 · HAGSTOVA@HAGSTOVA.FO · WWW.HAGSTOVA.FO